Opið er mánadag-fríggjadag
kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@tilhald.fo
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Mánadagin 30. okt.:
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45: **Enskt talumál á loftinum**. Tilmelding á tlf. 316491
kl. 14.00-17.00: Kortspæl, telving, landastrok, kánus, bobbspæl, dart o.o. spøl.
**Telduprátið, enskt 1-2 og tekning og máling verður tá ið hølini á 1. hædd eru liðug.**
*Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan mikudag og fríggjadag. Tilmelding á tlf. 316491.*
Týsdagin 31. okt.:
kl. 10.00-11.30: Vit synja, Simmi Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: ***Almennur tíðindafundur. Fjølbýlið í Fugloy. Greitt verður frá tekningini og hugskotinum***. Bygginevndin
Mikudagin 2. nov.:
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 10.00-17.00: Vælgerandi handverksætlan á loftinum.
***Smiðjuni í Lítluvík***
***Søla av handverkslutum frá 17.-22. nov. kl. 15-20. Øll eru hjartaliga vælkomin.***
kl. 12.00: Døgurði.
kl. 15.00: Túrur: við ella uttan stavar, úr Tilhaldinum yvir Strond og heim eftir Hoyvíksvegnum
Hósdagin 2. nov.:
kl. 10.00-10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen.
***Enskt talumál 1 á loftinum.***
Tilmelding: 316491
Kl. 11.00: **Lesibólkur:** Kjakast um bókina: »Lívsins summar« hjá Oddvør Johansen. Samskipari Bergljót Madsen
kl. 14.00-16.00: Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
Fríggjadagin 3. nov.:
kl. 10.00-13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou.
kl. 10.00-17.00: Vælgerandi handverksætlan á loftinum.
kl. 12.00: Døgurði
kl. 14.00-17.00: Opið hús.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

### Losjan í Havn

*Tinghúsvegur 18*
Fríggjadagin kl. 15.00 hittast tilkomin og eldri til hugna.

### Dagtilhaldið á Strondum

Týsdagin 31. oktober kl. 15:00 til 18:00. Jógvan prestur sigur frá. Øll eru vælkomin

### Eldrafelagið Kumlá á Skála

hevur hugnaløtu í húsum felagsins týskvøldið 31.10. kl. 19.00.

### Tilhaldið á Toftum

*Tlf. 448690*
*Vit halda til í niðaru hædd á Vesturskin.*
*Teldupost: tilhaldnes@post.fo*
Opið er týsdag, mikudag og hósdag. Frá kl. 15.00 – 18,00
*Vit hava hvønn dag ein góðan drekkamunn, eins og vit hava nógv spøl, og annað ítriv. Vit ynskja at øll kenna seg væl og hugnað sær.*

### Dagtilhaldið Vesturskin

***Opið er týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00.***
***Týsdag*** - fimleikur
***Mikudag*** - Sangløta.
***Hósdag*** - ymist ítriv.
*Allar dagar er møguleiki at lesa bløðini og fáa sær ein góðan drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

### Dagtilhaldið Fløvi

*í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.*
*Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.*
*Opið mánadag til fríggjadag kl. 15.00 – 18.00.*
***Fríggjadagur 27. okt.***
Fimleikur.
Skrá viku 44.
Mánadagur 30. okt. Boccia.
Týsdagur 31. okt. Telduhugni v. Jens Dalsgaard.
Mikudagur 1. nov.
Allahalgannadag er dagtilhaldið stongt.
Hósdagur 2. nov.
Myndaveving v. Gretu Olsen.
Fríggjadagur 3. nov.
Fimleikur.

### Dagtilhaldið í Luffustovu

Opið er týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15.
***Mikudag*** er ítriv við Rigmor.
***Hósdag*** er fimleikur við Áshild.
Øll eldri eru vælkomin.

Starvslýsing

# Nærverkið Stuðulstænastan

## Tvey størv innan Stuðulstænastuna

Stuðulstænastan søkir eftir tveimum stuðlum, sum í høvuðsheitum skulu samstarva innan økið við menningartarnaðum brúkarum í Tórshavn. Stuðlarnir skulu luttaka í einum tvørfakligum toymi.

Uppgávan er at stuðla brúkarum, ið búgva í egnum heimi, soleiðis at hesi gerast meira sjálvbjargin og fáa ein mei ra mennandi gerandisdag.

**Førleikakrøv**
Stuðulstænastan ynskir stuðlar við viðkomandi útbúgving t.d. sum pedagogur, heilsuatstøðingur ella líknandi útbúgving. Um eingin umsøkjari er við útbúgving, kunnu størvini verða sett við øðrum umsøkjara.

**Vit bjóða**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Ein virknan tvørfakligan starvsfólkahóp
- Samávirkan á gerandis uppgávur
- Kunning í arbeiðnum og supervisión

**Lønar- og setanartreytir**
Størvini verða sett skjótast tilber. Talan er um tvey ¾ størv innan Stuðulstænastuna. Í høvuðsheitum er talan um arbeiði í dagtímunum, men roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði.

Setanarøkið er Nærverkið við tænastu innan Stuðulstænastuna. Lønin verður ásett eftir sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Viðvíkjandi øðrum útbúgvingum, sum ikki primert eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá Føroya Pedagogfelag.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at venda tær til Fíu Jespersen ella ein av ráðgevarunum á tlf. 354020.

Send eina umsókn við møguligum prógvum og viðmælum til:

Stuðulstænastan
Løkjatún 1
160 Argir
Stílað: Oda Jóhansdóttir, virkandi deildarleiðari

**Umsóknarfreistin er 15. november 2006.**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

sansir.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**

Starvslýsing

# Nærverkið Trivnaðartænastan

## Pedagogar til Bústovnin á Eirargarði 16A/BN

Trivnaðartænastan søkir eftir pedagogum til Bústovnin Eirargarður 16 A/BN. Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk, har fleiri teirra hava likamlig brek.

**Vit vænta, at tú**
- ert likamliga væl fyri
- ert áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og
- ert opin fyri nýhugsan.

Harafturat er neyðugt, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og samstarva við onnur, umframt at tú skalt vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðnum.

**Vit bjóða**
eitt spennandi og avbjóðandi starv, sum millum annað fevnir um at vegleiða búfólki í øllum tí, sum tey hava tørv á, og at menna hvønn einstakan til at húsast saman í felagsskapi. At skapa trivnað og á ein pedagogiskan hátt tryggja búfólkunum menningarmøguleikar og saman við teimum skipa innihaldið í gerandisdegnum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett 1. desember 2006 ella eftir nærri avtalu.

Setanarøkið er Nærverkið við fyribils tænastu á Bústovninum á Eirargarði 16 A/BN. Størvini eru tænastumannastørv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið á lønarstigi 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Talan er um fulltíðarstørv, 40 tímar um vikuna. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Um eingin pedagogur søkir, verða størvini sett við hjálparfólki sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til leiðaran á Bústovninum á tlf. 315422 ella 315423

Send tína umsókn við møguligum prógvum, viðmælum og CV til:

Bústovnurin á Eirargarði 16A/BN
100 Tórshavn
Stílað: Leiðarin

**Umsóknarfreistin er 17. november 2006.**

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

sansir.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

**www.naerverk.fo**